FØROYA HANDILSSKÚLI




# Skattarættur I

Treytað av nóg stórari tilmelding verður "Skattarættur I" boðin út nú í heyst.

"Skattarættur I" er **ætlað teimum** sum:
- arbeiða við skattlig viðurskifti ella
- hava áhuga í økinum ella
- ynskja at gerast skrásettir grannskoðarar. Fyri at gerast skrásettur grannskoðari krevst HD í Roknskapi og Búskaparstýring ella líknandi og lærugreinirnar "Skattarættur I" og "Skattarættur II og vinnulívsløgfrøði".

"Skattarættur I" er á **merkonom støði** smb. gomlu merkonom útbúgvingina. Um tú hevur "Skattarætt I" og aðra lærugrein á gomlu merkonom útbúgvingini, ber til at fáa eina **lærugrein góðskrivaða** á Akademiútbúgvingini.

**Upptøkukrav** til "Skattarætt I" er miðnámsútbúgving ella tilsvarandi.

Tað er ein avgjørdur **fyrimunur** í undirvísingini á "Skattarætti I", at tú hevur **innlit í roknskap** (roknskaparfatan). Innlit í roknskap kanst tú t.d. hava fingið í lærugreinum sum virkisbúskapi og líknandi.

Til teirra, sum ikki áður hava havt roknskap, ella sum ynskja at uppfríska sína vitan innan roknskap, bjóða vit **skeið í roknskaparfatan**.

**Undirvísingin í roknskaparfatan** verður á Føroya Handilsskúla í Havn mikudagin **14. november** (vika 46) kl. 15.00-18.00 og mánadagin **19. november** (vika 47) kl. 15.00-18.00. Tilmelding til skeið í roknskaparfatan er á sama innskrivingarseðli, sum verður nýttur til "Skattarætt I".

**Undirvísingin í "Skattarætti I"** verður á Føroya Handilsskúla í Havn **týsdagar kl. 14.00-17.30**.

Byrjað verður 30. oktober 2007 og endað verður 12. februar 2008.

Próvtøkan, ið er skrivlig, verður eftir ætlan í seinnu helvt av februar (viku 8 ella 9) .

Um nóg nógv tekna seg í Eysturoy/Norðoyggjum, er ætlanin at **stovna ein flokk á Handilsskúlanum á Kambsdali** eisini. Ætlanin er at undirvísingin verður hósdagar 18.00-21.30 ella eftir avtalu við skúlan.

**Kostnaðurin** fyri "Skattarætt I" er 2.400,- kr. og fyri skeið í roknskaparfatan 500,- kr.

**Tilmeldingarseðil er á heimasíðu handilsskúlans** www.fh.fo og verður tilmeldingarseðilin at senda til Tórhild Magnussen, tm@hsh.fo í **seinasta lagið 22. oktober 2007**. Tilmeldingin er bindandi.

Ætlanin er at bjóða lærugreinina "Skattarættur II og vinnulívsløgfrøði" í tíðarskeiðnum mars-juni 2008. Upptøkukrav til hesa lærugrein er, at "Skattarættur I" er staðin. Vinarliga **set kross á tilmeldingarseðlinum, um tú ert áhugað/-ur í "Skattarætti II og vinnulívsløgfrøði"**.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tel 317177
Telefax 313374

**Heimasíða skúlans:**
**www.fh.fo**

# Fólk til farmastøðina á Drelnesi

Við hesum verður søkt eftir einum fólki til farmastøðina á Drelnesi at seta í fast starv. Freistin at søkja starvið er fríggjadagin 19. oktobur 2007 kl. 12:00. Sí lýsingina á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

SERNÁMSDEPILIN

# Sálarfrøðingur í NSR tænastuni í Eysturoy

Í Sernámsdeplinum er eitt sálarfrøðistarv leyst til setan skjótast til ber. Dagliga tænastustaðið er í NSR tænastuni í Eysturoy, Glyvravegur 10 B, Glyvrar.

NSR tænastan er eitt samtak ímillum Sernámsdepilin og Runavíkar-, Nes-, Sjóvar-, Leirvíkar-, Gøtu- og Fuglafjarðar kommunur. NSR tænastan virkar sum sjálvstøðugur stovnur undir Sernámsdeplinum og veitir skúlum, stovnum, foreldrum og myndugleikum námsfrøðiliga- og sálarfrøðiliga ráðgeving.

Høvuðsuppgávan hjá NSR tænastun er at kanna førleikastøðu og læruumstøður hjá børnum við serligum tørvi og at ráðgeva í skipan av undirvísingarligum- og mennandi tiltøkum fyri hesi. Manningin í NSR tænastuni er ein samskipari, ein sálarfrøðingur og 3 serlærarar/ráðgevar

Sálarfrøðingurin, ið vit sóknast eftir, hevur ein týðandi lut í hesum toymi, ið í samstarvi við Sernámsdepilin støðugt skal menna sernámsfrøðiliga virksemið.

**Útbúgvingarkrøv og eginleikar**
- Cand. ped. psyk./ cand. psyk. – ella samsvarandi. Fyrimun hevur umsøkjari, ið hevur arbeitt við børnum.
- Fakligan førleika og hug at arbeiða bæði við kliniskt – psykologiskum og pedagogiskt – psykologiskum uppgávum.
- Duga at nýta kanningarúrslit í ítøkiligum undirvísingar – og viðgerðartilmælum.
- Hava hug og evni til neyvt samstarv við aðrar fakbólkar.
- Vitan um nervasálarlig greiningaramboð er eisini ein fyrimunur.

Løn eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314522/ 225803, (e-mail hanseli@snd.fo) ella Hans Jón Juul Thomsen, samskipara, tlf. 239190, (e- mail hjt@nsreystur.fo)

Umsókn við avriti av próvskjølum v. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í senasta lagi mánadagin tann 12. november 2007 og skal sendast til:

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

SERNÁMSDEPILIN

# Avloysari fyri talilærara

Vegna farloyvi skúlaárið 07/ 08 sóknast vit eftir talilærara skjótast til ber at veita taluvenjing og at virka í talumennandi arbeiði við børnum og ungum ( 0 – 18 ár). Í mestan mun at arbeiða við smáum talibólkum í Sernámsdeplinum, men onnur skipan kann eftir umstøðunum eisini koma fyri. Eftir útbúgving og førleika kann tann, ið settur verður, fáa aðrar uppgávur á samskiftisøkinum. Talan kann eisini vera um 2 parttíðarstørv.

**Førleikakrav**
Útbúgvin talilærari, audiologopedur, pedagogur ella lærari við serlæraraútbúgving ella á annan hátt útbúgvin/ eftirútbúgvin umsøkjari við royndum at arbeiða við smábørnum, og sum hevur áhuga at talivenja við børnum og at luttaka í talimennandi arbeiði annars.

**Løn**
Eftir sáttmála við avvarðandi Fakfelag.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møguligum viðmælum eigur at vera Sernámsdeplinum í hendi tann 26. oktober 2007.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali – hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo